# Føroyingar hjálptu hjartasjúku Evu

**Yvir 300.000 krónur komu inn frá tiltøkunum "Sing for Life", sum vóru hildin í Føroyum seinast í novembur í fjør. Peningurin fór til eina skurðviðgerð til 12 ára gomlu, hjartasjúku Evu Kononova úr Ukraine**

INNSAVNAN
*Solby A. Eliasen*


*12 ára gamal Eva Kononova er púra frísk í dag eftir, at hon hevur fingið eina skurðviðgerð fyri hjartað*

Tíðindaskriv er sent út frá Skandinavisku Barnamissiónini, har tey vísa sítt takksemi til føroyingar fyri hjálpina.

– Tit føroyingar munnu vera verðins gávumildasta fólkaslag, sigur Bo Wallenberg í tíðindaskrivinum.

Hann vísir á, at tað komu umleið 350.000 svenskar krónur inn í Svøríki, meðan tað komu góðar 320.000 krónur inn úr Føroyum.

Tá Skandinaviska Barnamissiónin gjørdi av at fara til Føroyar við hesum tiltakinum, varð sagt í Aftonblaðnum, at tað var burturspilt tíð at fara til Føroyar, tí her búgva bara góð 40.000 fólk, og tí ikki nógvir pengar at heinta. Men tey orðini hava føroyingar so sanniliga gjørt til skammar, tí tað komu sum sagt yvir 300.000 krónur inn bara úr Føroyum.

Tiltakið, sum var her í Føroyum fyri hálvum ári síðani, varð skipað soleiðis, at tað komu fýra kendir operasangarar úr Ukraina til Føroya at halda fýra konsertir í landinum, har fólk so kundu fara at lurta og lata eina peningagávu.

Eva bleiv so løgd undir skurð, og alt gekk væl. Men tveir dagar aftaná brast hjartavevnaðurin hjá henni, og hon bløddi illa. Hetta longdi um uppihaldið hjá Evu á sjúkrahúsinum við hálvum ári. Í hesum tíðarskeiðinum var hon í lívsvanda, og ongin visti, um hon fór at megna tað. Tilsamans fekk hon umleið 40 litrar av blóði, og fyri bert einum mánaði síðani vóru læknarnir tilreiðar at geva upp, og Eva skuldi fara heim at siga familju sínari farvæl.

Bo Wallenberg sigur, at tey vóru mong, sum bóðu fyri lívinum hjá Evu, og at Harrin bønhoyrdi tey í hesum sváru tíðunum. Tí í dag er Eva heilt frísk, og hon slapp heim til Ukraina 1. mai.

– Hetta hevur verið ein ómetaliga torfør tíð hjá Evu og ommu hennara. Men kærleikin frá menniskjunum í Norðanlondunum hevur hjálpt teimum væl. Tað eru komin nógv brøv og nógvar heilsanir úr Føroyum til sjúkrahúsið, og Eva strálaði av lukku hvørja ferð, sigur Bo Wallenberg.

Hann leggur at enda afturat, at viðgerðin hjá Evu bleiv nógv dýrari enn ætlað, men hann staðfestir við miklari gleði, at tann peningurin, sum tørvur var á, er komin inn á konto-ina hjá Skandinavisku Barnamissiónini.

– Lívið hjá Evu er bjargað, og vit takka Gudi, tykkum føroyingum og øllum teimum, sum hava verið ein hollur stuðul allan vegin ígjøgnum viðgerðina, sigur Bo Wallenberg, sjefur fyri Skandinavisku Barnamissiónini.

# Vánalig uppmøting til foreldrafund

**Hóskvøldið høvdu Ósáskúlin og Skúlin á Ziskatrøð í Klaksvík ein stóran felags foreldrafund. Hetta er fyrsta ferðin skúlarnir hava havt felags foreldrafundirnar saman, og gekk tað væl, hóast uppmøtingin var stak vánalig**

FORELDRAFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*


*Báðir fólkaskúlarnir í Klaksvík høvdu hósdagin ein felagsforeldrafund. Uppmøtingin var stak vánalig, tí bara millum 80 og 90 foreldur vóru møtt upp, og tað eru yvir 600 næmingar á báðum skúlunum tilsamans*
*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Ósáskúlin og Skúlin á Ziskatrøð í Klaksvík høvdu hóskvøldið felags foreldrafund. Hetta er fyrsta ferðin teir báðir skúlarnir hava havt felagsforeldrafundin saman, og Óluvá Klettskarð, forkvinna í skúlastýrinum fyri skúlan við Ósánna, letur væl at fundinum.

– Vit skulu hava ein felags foreldrafund um árið fyri allar flokkarnar, og í ár valdu vit so at hava hann saman við Ziskatrøð, tí tey hava ikki umstøður til hetta á teirra skúla, sigur Óluvá Klettskarð.

### Vánalig uppmøting

Tað eru yvir 600 næmingar tilsamans á teimum báðum skúlunum, og til foreldrafundin vóru tað bara eitt stað millum 80 og 90 foreldur, sum møttu upp.

– At fáa foreldur at møta upp til felags foreldrafundirnar er ringt, sigur Óluvá Klettskarð.

Í fjør høvdu skúlarnir hvør í sær felags foreldrafundir, og tá var uppmøtingin eins vánalig. Umleið 40-50 foreldur til hvønn skúlan.

Óluvá Klettskarð sigur, at foreldrafundurin eydnaðist væl. Upplegg vóru, sum hóskaðu seg til báðar skúlarnar, og eisini vóru fólk, sum hava tilknýti til skúlan bjóðað á fundin at hava upplegg. Tað verið seg tannlækni og heilsusjúkrasystir. Ein lærari hevði eisini eitt upplegg um næmingatillagaða undirvísing.

– Tá fundurin varð liðugur, fingu foreldrini høvi til at fara út í kjakstovur. Vit hava fingið ógvuliga positivar viðmerkingar um fundin bæði meðan hann var, og aftaná fundin, so tað kann væl hugsast, at vit fara at gera hetta aftur, sigur forkvinnan í skúlastýrinum at enda.



# Uttan sameining siga børnini okkum farvæl

**Martin Hansen, sum er kommunustýrislimur í Haldórsvíkar kommunu, heldur, at dagurin í dag er ein lagnudagur, nú atkvøðast skal um kommunusamanlegging.**
**- Verða kommunurnar ikki lagdar saman, og verður økið ikki munandi ment og útbygt, so siga okkara egnu eftirkomarar okkum farvæl, sigur hann**

ATKVØÐUGREIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

- Dagurin í dag, 6. mai, er ein lagnudagur í Haldórsvíkar-, Hvalvíkar-, Hósvíkar-, Sunda-, Gjáar- og Saksunar kommunu, tí í dag skulu fólk í hesum kommunum taka støðu til kommunusameining. Tvinnir eru møguleikarnir - ja ella nei.

Hetta sigur Martin Hansen, sum er kommunustýrislimur í Haldórsvíkar kommunu.

### Kensluborið mál

Hann ásannar, at hetta er eitt sera viðkvæmt mál, tí so nógvar kenslur eru uppi í, tá ið slíkar avgerðir skulu takast.

- Hvør er góður við sítt, og ein stórur partur av eins samleika er, hvaðani tú kemur. Hetta eru "vit" í mun til "hini" - og "hini" eru tey í hinum kommununum. Óttin snýr seg um at missa seg sjálvan burtur, um vit bert gerast lítil partur av eini størri heild. Hesin tanki er menniskjansligur og náttúrligur, heldur Martin.

Hann vísir á gongdina seinastu árini, har vit øll hava upplivað, at Føroyar spakuliga eru gingnar saman í meginøkir og útjaðarar.

- Hetta eru útjaðarar, sum ikki hava lív lagað, men sum so við og við følna og mest av øllum enda sum økir við summarhúsum. Hetta er ein avleiðing av okkara menning. Vit geva okkara børnum góða útbúgving, senda tey út í stóru verð at læra, men mong teirra koma ikki aftur. Tí "einki" er at koma aftur til, halda tey.

Martin sigur, at tey, ið hava fingið sær útbúgvingar, eru við øðrum orðum vorðin minni heimsføðislig. Tey hugsa øðrvísi enn eldra ættarliðið. Sjálvt um tey eru góð við heimbygdina, seta tey seg heldur niður, har tilboðini eru størri og meira nútímans.

- Tey ungu seta krøv, sum smákommunurnar ikki makta. Krøvini kunnu snúgva seg um barnagarðar, blómandi mentanarlív, nútímans arbeiðspláss, ellis- og røktarheim, ítróttarmøguleikar og handilsfasilitetir.

### Siga farvæl

Kommunustýrislimurin vísir á, at allar smákommunur kenna hendan trupulleika og hava roynt at bøta um hetta við at menna interkommunalt samstarv. Men tíverri er bygnaðurin og skipanin av hesum samstarvi ein sera seinfør og ineffektiv organization. Ein orsøk til hetta er, at hvør kommuna hevur vetorætt í hvørjum máli, og hesin sýtingarrættur verður mangan nýttur ov seint, t.d. tá ið stór og drúgv arbeiði longu eru fingin frá hondini.

- Hetta skapar sjálvandi stóra frustratión hjá teimum, ið hava brúkt nógvar kreftir til burturspilt arbeiði, sigur Martin.

Hann heldur ikki, at interkommunala samstarvið, sum vit kenna tað í dag, er nóg mennandi hjá kommununum til at kunna halda tørn; tí verða kommunurnar afturút sigldar.

- Eg haldi tí, at uppskotið um kommunusameining er framkomið, og kanska fer tað at bjarga okkum og okkara øki undan at gerast útjaðaraøki.

Martin er tó sannførdur um, at verða kommunurnar ikki lagdar saman, og verður økið ikki munandi ment og útbygt, so fara eftirkomararnir at siga okkum farvæl.

### Góð kort

Hann heldur hinvegin, at ein nýggj stórkommuna hevur nógv góð kort á hondini.

- Brúgvin við Streymin fer at liggja mitt í kommununi. Haðani er bert ein hálvur tími til Havnar, flogvøllin, Runavíkar, Leirvíkar og Klaksvíkar, tá ið tunnilin er komin.

Martin ivast ikki í, at ein stór Sunda kommuna heilt náttúrligt fer at kunna bjóða seg fram sum eitt sentralt landspolitiskt øki, bæði viðvíkjandi skipaferðslu, upplossingarhavn og sum heimstaður fyri almennar landsstovnar.

- Vit vita øll, at har okkurt ferð fram, kemur meira afturat, sigur hann.

### Størri ávirkan

Í eini stórkommunu vil borgarstjórin eisini hava landspolitiska ávirkan.

- Dag og dagliga eru borgarstjórarnir úr hinum stórkommununum í fjølmiðlunum, og landspolitikararnir lurta eftir teimum. Teir eru jú ein politiskur faktor sum talsmenn fyri eina stóra veljarafjøld. Ein stórkommuna hevur nógv størri kjans at gogga í tann partin av okkara egna pengi, sum eitur landsskattur.

Martin sigur, at sum stórkommuna hava smákommunurnar gjørt sær ta mest effektivu skipanina fyri at yvirliva.

- Vit mugu leggja tað køvandi og drepandi smáklandrið millum kommunurnar og bygdinar aftur um bak. Tíðin er farin frá hesum, og ungdómurin veit hetta.

Hann vísir á, at Felagsskúlin á Oyrabakka longu hevur skapt tann stórkommunala sálarliga felagsskapin.

- Longu nú hava vit vant okkum til, at vit oftari hitta bygdamenn í handlunum við Streymin enn heima í bygdini. Vit eru ikki fremmand fyri hvørjum øðrum, sigur kommunustýrislimurin.

### Børnini støðast

Martin er sannførdur um, at bert sum stórkommuna, eru menningarmøguleikarnir nóg góðir til, at børnini fara at støðast. Hetta er tað sentrala og avgerandi í hesum máli.

- Bert sum stórkommuna hava vit fíggjarliga orku til at skapa karmar fyri eini framtíð, har okkara egnu børn koma at hava tann avgerandi leiklutin, sigur Martin Hansen, kommunustýrislimur í Haldórsvíkar kommunu.


*Martin Hansen heldur, at Felagsskúlin á Oyrabakka longu hevur skapt tann stórkommunala sálarliga felagsskapin.*


*Fólk í Hósvíkar kommunu eru eftir øllum at døma ivasom um samanlegging. Í Haldórsvíkar kommunu er lítil ivi, og mett verður, at meiriluti eisini verður í Sunda kommunu fyri samanlegging*

# Val um sameining verður í dag

**Fólk í seks kommunum fara í dag at atkvøða um samanlegging**

ATKVØÐUGREIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Í dag hava fólk í tilsamans seks kommunum høvi at atkvøða um sameining ella samanlegging. Talan er um at leggja saman Haldórsvíkar kommunu, Hvalvíkar kommunu, Saksunar kommunu, Hósvíkar kommunu, Sunda kommunu og Gjáar kommunu.

Ein sameiningarbólkur hevur sitið í umleið eitt ár og lagt arbeiði til rættis. Bólkurin hevur verið umboðaður við tveimum fólkum úr hvørjum kommunustýri.

Seinastu tíðina hava borgarafundir verið í øllum kommununum, og at enda hevur eisini ein felags fundur verið í Eydnuni á Oyrarbakka.

Væl av fólki hevur verið á borgarafundunum, og tá ið fundurin var í Eydnuni á Oyrabakka, 29. apríl, var húsið fullsett.

Valið, sum fer fram í dag, verður á vanligu valstøðunum í øllum seks kommununum, og valhølini eru opin frá kl. 10-14 og 16-20.

Skal valið verða gyldugt, krevst vanligur meiriluti í hvørji kommunu sær, og kommunurnar skulu umboða í minsta lagi 70% av samlaða fólkatalinum.

### Sunda kommuna er størst og avgerandi

Av kommununum í ætlaðu samanleggingini, er Sunda kommuna størst við 32% av fólkatalinum, næst kemur Hvalvíkar kommuna við 25%, á triðja og fjórða plássi Hósvíkar-og Haldórsvíkar kommuna við 18% hvør, síðan Gjáar kommuna við 4% og at enda Saksunar kommuna við 2% av samlaða fólkatalinum.

Í Sunda kommunu eru bygdirnar, Norðskáli, Oyrarbakki og Oyri. Skal samleggingin hava nakra meining, meta tey, sum sita í sameiningarbólkinum, at Sunda kommuna eigur at verða við, tí annars verður gloppið ov stórt millum bygdirnar. Tað er Sunda kommuna, sum bindir økið saman í eina heild.

Eiðis kommuna er ikki við í ætlaðu samanleggingini.

Atkvøðugreiðslan í dag er søgulig á tann hátt, at atkvøtt verður í seks kommunum um samanlegging.